# Táið Veðrurin lembdi!

**Tórbjørn Jacobsen**



Gjaranesprestur hevði eina skemtiliga grein í dystarskránni hjá strandingum hetta vikuskiftið. Frá tíðini hann dvaldist í Ónagerði. Ein viðingur setti eitt gott veðurlamb inn á básin um heystið, tað handlaðist framúr, og hann ivaðist ikki í, at hetta fór at gerast ein frágerða brundseyður til heimaseyðin í gerðinum. Men táið várið kom lembdi ongin heimaær hjá honum. Várið eftir bragdaði tó, tá lembdi brundseyðurin ikki færri enn tvey lomb. Viðingar hildu hetta vera tekin um heimsins enda, tí veðrur hevði ikki lembt í Norðoyggjum áður, og als ikki tvey. Soleiðis kann sjálvt hin besti fara skeivur í sínum metingum og ætlanum.

Júst, sum øll hildu, at friður aftur valdaði í Tjóðveldisflokkinum, kyknaði eldur úr eimi av nýggjum. Orsøkin er ein grein, sum Georg hevur snikkað saman, eftir at hava tosa við undirritaða í telefonini fríggjamorgunin. Hann ringdi, fyri at fáa mínar viðmerkingar til savnandi fráboðanina frá flokkinum, ið varð send út til fjølmiðlarnar, sum tíðindaskriv hósdagin, og eftir at útvarpið hevði tulkað skrivið, sum eina treytaleysa umbering frá mínari síðu. Eftir at hava tosað um hetta eina løtu, og eg kendi meg sannførdan um, at tann journalistiski parturin av prátinum var avgreiddur, fall prátið m.a. á Team85 dómin. Dimmalætting er ígjøgnum lýsingarfyritøkuna annar parturin í tí málinum, og hevði eisini skrivað so bragdliga um tað, at Høgni Hoydal skuldi eiga hugskotið til hina so vanlukkuligu lýsingina. Haðani spratt tosingarevnið. Sjálvur havi eg ongantíð havt nakað sumhelst við hetta lýsingarmálið at gera, kenni tað harvið ikki. Tí er tað óránnsakiligt, at hetta gjørdist ein partur av almennu samrøðuni. Av ringum royndum átti ein at fingið samrøðuna lisnað, áðrenn hon varð prentað, Dimmalætting kann jú hava sjálvsagdar orsøkir fyri at vinna tjóðveldismonnum neisir, men eitt áhugavert FAS-seminar úti á Sjómansskúlanum forðaði mær í hesum.

Og blaðmaðurin undirspælir ikki táið hann kókar hesi bæði málini upp í einum og sama potti. Men líkamikið hvat varð sagt frá mínari síðu, meira ella minni í spølni kanska, tí eg ivaðist ongantíð í, at tosað varð out of record, um tað málið, so var tað hvørki ætlað sum ískoyti til hitt nú so kenda málið, - tíansheldur til referat yvirhøvur. Tað hugsi eg at Georg man vita. Gjørdist tí líka so skakkur sum viðingurin, táið brundseyður hansara lembdi tvey, tá ið eg fyrst hoyrdi um og síðani las Dimmalættingina til leygardagin. Helst hevði Georg onga framsíðu og tók tí kjansin, vælvitandi at hetta var spreingistoff, sum kundi selja eina avís. Never mind, hetta hevur nú staðið á prenti og hevur av góðum grundum skapt eina nýggja øsing, eftir at semja varð um, at málið hjá okkum báðum formanninum var lagt afturum og gloymt. Av tí at eg ongantíð hevði ætlað at kynt undir nakað stríð aftur, kom hetta ógvuliga dátt við, og í sama viðfangi gevur undirritaði teimum, sum hava verið fyri órøttum tá ið Team85 málið, manipulatiónir í sama andadrátti og samankoblingar ímillum tvey mál, sum onki hava við hvørt annað at gera, eina treytaleysa umbering, fyri tann partin, sum undirritaði nú varðar av, av greinini hjá Georg í leygardagsdimmuni, og sum er samrøðuni um semjuna í tingbólkinum hósdagin fullkomuliga óviðkomandi.

Men Dimmalætting og aðrir fjølmiðlar skula kanska fyrigevast, tá ið teir helst eru villeiddir av tendensiøsu tíðindunum í Útvarpi Føroya hóskvøldið um semjuna, sum vit høvdu viðgjørt og vóru blivin samd um á fundi sama seinrapartin, og sum varð send útvarpi, sjónvarpi og bløðum. Gunnar Skúvadal fýrdi ikki fyri at kalla fráboðanina eina umbering frá mínari síðu. Hann samrøddi nýggja næstformannin, Karsten Hansen, og fólk fingu ta greiðu fatan, at undirritaði hevði ligið fram eftir rommum og sleikt iljarnar á einhvørjum tá ið semjan varð undirritað. Harrin má vita, hvørið hevði stungið hesa blóðskeivu tulkingina upp ímillum syllarnar á honum? Ringdi til tíðindamannin beinanvegin, men fekk ikki fatur á honum fyrrenn tíðindasendingin var liðug. Hann var hvørki til at høgga ella at stinga í. Ætlaði sær ikki at koma við eini rætting. Morgunin eftir tosaði eg við tíðindaleiðaran í úf um hetta sama, hann tóktist meira meðgjørligur, men tað hoyrdist ongantíð nakað aftur frá almenna public-service stovninum, sum átti at viðgjørt allar samfelagsins borgarar javnbjóðis, men soleiðis skuldi ikki vera. So kunna teir njóra til dómadags um tað, at teir ikki fáa fatur á undirritaða, men hvat í Guðs garði skuldi eg tosa við útvarpið um, eftir at teir líka so nonsjalant lótu ósannindini standa frá hóskvøldinum og frameftir? Harrin havi lov fyri, at hetta ikki er einasti fjølmiðilin í landinum. Og hendan søgan vísir okkum eisini, hvussu lívsneyðugt tað er, at tíðindaredaktiónirnar verða hildnar atskildar og óheftar av hvørji aðrari í hinum samanlagda almenna fjølmiðlamastodontinum, sum fer úr barkastokki um skamma stund.

Hevði ikki sitið á fundi alla náttina til hóskvøldið, og stríðst fyri eini semju, fyri at almenningurin ígjøgnum útvarpið kvøldið eftir skuldi fáa eina so blóðskeiva, tendensiøsa og subjektiva tulking av tí sum veruliga er skjalafast í hesi somu semju. Hon er prenta í fullum líki í Dimmu leygardagin, og soleiðis kann ein og hvør staðfesta, at umberingar-fyribrigdi ikki er nevnt í fráboðanini. Heldur ikki er nakað tikið aftur tíansheldur avsannað, av tí sum skrivað var frammanundan semjuni. Ásannað verður, at okkurt kundi verið øðrvísi og harmast verður um flokkur og formaður hava verið fyri trúvirðismeini av hesum. Tú kanst harmast um, at tú koyrir 90 km/t við eini einum bili harið tað bert er loyvt at koyra 80 km/t, men harfyri fer tú ikki eina kanossagongd kring landið og biður um umbering fyri tað. Tú fært í ringasta føri eina bót, er tú so óheppin, at vera komin í kikarasiktið hjá danska løgregluvaldinum.

Hevði vóna og vóni framvegis at hendan semjan heldur. Formaðurin og næstformaðurin hava alment, eins og Risin á Leittrabergi og Nornagestur, herja á undirritaða, um hetta sum skrivað var í leygardagsdimmuni. Og tað er væl skiljandi. Tó kundu teir havt kunnað seg eitt lítið sindur meira um málið áðrenn teir í óðum verkum lótu seg draga uppá tráð av útvarpinum, sum longu hóskvøldið indikeraði hvørið teirra ætlan var í hesum máli. Undirritaði ætlaði ongantíð at siga eitt einasta orð um hetta málið aftur, men soleiðis sum fólk høvdu skilt semjuna, sambært útvarpstíðindunum, so helt eg tað vera neyðugt at úttala meg til bæði Dimmalætting, SVF og Rás2, bara fyri at javnvág skuldi koma í málið aftur.

Hefti meg annars við, at formaðurin segði við útvarpið, at semjan skuldi skiljast soleiðis, at nú var ein strika sett í sandin og at støðan var nullstillað. Tvs. flutt aftur til útgangspunktið áðrenn málið tók seg upp. Í sama andadrátti legði hann undirritaða undir at vera lopnan frá semjuni. Hetta er ikki eitt persónsálop, men í mínum hugaheimi leyp Høgni Hoydal frá semjuni longu ein hálvan tíma eftir at hann hevði skrivað undir semjuna. Hetta hendi táið næstformaður skuldi veljast í tingbólkinum. Ein av hinum tingmonnunum skeyt undirritaða upp sum valevnið. Segði onki. Nú skuldi semjan standa sína roynd. Stemningurin gjørdist elektriskur. Formaðurin bað fólk um at fara út at roykja og at konspirera, sum hann tók til. Hvør skal siga? Støðan var onki broytt táið fundurin varð uppafturtikin. Formaðurin høgdi hendan gordiska knútin av í einum høggi, tá ið hann boðaði frá, at hann undir ongum umstøðum kundi liva við, at undirritaði aftur gjørdist næstformaður í tingbólkinum. Hendan sanktiónin frá hansara síðu mátti so týða tað, at støðan ikki var nullstillað, og at har fanst ongin strika í sandinum. Hann hevði tikið valbærið frá einum av demokratiskt valdu tingmonnunum í tingbólkinum. Tá ið tað ráddi um sessir innanflokka. Áðrenn eg fór av fundinum boðaði eg honum frá, at hetta helst var fyrsta ferðin, at ein semja sum eg hevði undirritað var brotin, og at ongin ivingur var um, at tað var hann, sum var lopin frá, áðrenn blekkið var tornað. Hetta kunna øll sum vóru á fundinum vátta, um tey annars hava dirvið til tað. Tað kostar sum kunnugt at svimja ímóti streyminum.

Lat meg til endans staðfesta, einaferð enn, at ein treytaleys umbering hervið verður veitt formanninum, fyri tann partin av greinini í leygardagsdimmuni, sum als onki hevur við sjálva semjuna og tulkingina av henni at gera. At leyst prát við ein tíðindamann, og sum als ikki relaterar til tað maðurin ringdi at frætta um, knappliga endar á framsíðini í landsins stórsta blaði, er ein sorgarsøga. Men sum Sigurð Joensen segði á sinni: "Journalistar eru eitt fólkaslag ein skal vara seg fyri." Vónandi eru allar misskiljingar við hesum beindar av vegnum, í einum málið, sum má hava ørkimlað ein hóp av fólki, ikki minst veljararnar hjá Tjóðveldisflokkinum kring landið.

Lati okkum nú umsíður leggja hetta málið afturum okkum og fara til verka á politiska vígvøllinum. Har nógmikið er fyri hendurnar. Annars endar tað sum hjá Jógvani Fríðrikssyni og Selmari Jacobsen tá ið ær teirra vóru brundgeldar norðuri á Viðareiði, og viðingar hildu, at skuldi man reka jarðarbrúk á tann hátt, so kravdust í minsta lagi tvær almennar lønir, skuldu endarnir fáast at røkka saman.

# Spøkilsilyftin á Býarbókasavninum

**Elin Lindenskov, býráðslimur**
*valevni Javnaðarfloksins*
*www.lindenskov.com*



VAL04

Á býarbókasavninum er eingin lyft. Tey rørslutarnaðu og illa gongdu sleppa ikki upp. Men Harry Potter og spøkilsir ferðast ótarnað upp og niður á bókasavninum hvønn dag, uttan at ganga trappurnar. Tí hugsaði eg, at har var kanska ein lyft hóast alt. Ein lyft fyri Harry Potter og spøkilsir.

Tað hevði ikki verið so galið, um har var ein lyft. Hon skuldi bara eisini tikið rørslutarnað og illa gongd.

Fleiri hava eisini gjørt vart við, at har átti ein lyft at verið. Í álitinum Mentan og list, sum kom út í 2000 stendur um Býarbókasavnið at "tað er beinleiðis skomm, at eldri og rørslutarnað eru útihýst frá hesi týðandi almennu tænastuni."

Hóast Tórshavnar kommuna, er væl vitandi um, at rørslutarnað og illa gongd ikki sleppa inn á býarbókasavnið, so skrivar hon á heimasíðuni: "Býarbókasavnið er fyri øll – børn og vaksin. Øllum stendur í boði at nýta savnið ókeypis, eisini fólki, sum býr ikki í Havn."

Býarbókasavnið verður nógv brúkt. Eini 60.000 vitjanir eru um árið. Eitt so stórt vitjunartal sigur, hvussu stóran týdning bókasavnið hevur fyri borgaran. Um Tórshavnar kommuna skal gerast ein kommuna fyri øll, so er alneyðugt, at vit hugsa um tey rørslutarnaðu og illa gongdu. Vit eiga beinanvegin at fáa eina lyft á býarbókasavnið. Eisini eiga vit at gera eina ætlan, sum greitt sigur, hvussu vit gera Havnina og alla kommununa til eina kommunu har rørslutarnað kunnu ferðast ótarnað allastaðni.

Tað kann vera, at Harry Potter og onnur ferðast við lyftini á Býarbókasavninum. Vit deyðiligu sum hava førleikan kunnu brúka trappurnar. Men tey rørslutarnaðu og illa gongdu eru dømd til at standa við langtandi eygum og síggja okkum ótarnaðu ganga trappurnar.



VIÐMERKINGAR

# Sum fanin lesur bíbliuna

**Hannis Egholm**

Í oddagrein hósdagin hevur blaðstjórin á Dimmalætting eina heldur enn ikki margháttliga útlegging av sakarmálinum millum Team 85, sum Dimmalætting eigur (!), og Tjóðveldisflokkin um m.a. tiltiknu lýsingina í Sosialinum undan næstseinasta løgtingsvali.

Greinin er ein løgin blanding av politikki, løgfrøði og privatum handilsáhugamálum. Hvussu blaðstjórin kemur til sínar niðurstøður, má hann helst sjálvur vita - fyri onnur er tað púra óskiljandi, men til hendan partin kann onkur annar enn eg kanska gera meira nágreiniligar viðmerkingar.

Av tí, at Ingi Samuelsen dregur meg persónliga upp í hendan ellibitan, kenni eg meg noyddan til at koma við nøkrum viðmerkingum. Ingi skrivar, at "Í sakarmálinum kemur greitt fram, at tað var táverandi kreativi leiðarin í Team 85 (eg!), sum hevði ábyrgdina av mistakinum."

Hvussu Ingi kemur til hesa niðurstøðu skilji eg slett ikki, tí vitnifrágreiðingarnar frá rættarmálinum, tvs. bæði mín egna og aðrar, vísa greitt, at so er ikki. Mistakið er heilt einfalt og bara, at lýsingin ikki varð send kundanum/flokkinum til góðkenningar, áðrenn hon varð send Sosialinum. Varð hon tað, so hevði flokkurin antin vrakað hana, ella góðtikið hana og staðið við ábyrgdini. Eg eri fullvísur í, at flokkurin hevði vrakað hana og sett eina aðra í.

Allar lýsingar eiga og skulu góðkennast av kundanum, sum serkøna vitnið eisini sigur í rættarmálinum, og tað varð hendan lýsingin ikki. Eg var sjúkur tann dagin lýsingin varð gjørd og send til Sosialin, og eri tískil ikki tann, sum setti lýsingina upp og forsømdi góðkenningarskylduna. Tað var onkur annar á Team 85, ið gjørdi mistakið. Hetta verður eisini staðfest í sakarmálinum.

Orsøkin til, at Team 85 kortini vann sakina er, at missur ella skaði av lýsingini ikki kundi staðfestast.

Síðani fer hugflogsríki blaðstjórin í holt við eitt ordans bryggj um mín leiklut sum "aktivur innan Tjóðveldisflokkin", og hvussu tað ávirkar alt málið og mína tilveru eftir, at eg segði upp á Team 85. Hvør ætlanin er við hesum hugleiðingum, veit eg ikki, men eg kann bara staðfesta, at mistakið førdi til eitt álitisbrot millum Team 85 og kundan, og meðan leiðslan á Team 85 varð drigið í rættin, so varð eg afturbiðin. Onkursvegna má hetta siga nakað um, hvar kundin/flokkurin plaserar ábyrgdina fyri mistakinum.

Eg eri ikki bangin fyri at viðganga mína støðu sum tjóðveldismaður, men má samstundis sláa fast, at endaliga viðmerkingin hjá blaðstjóranum á "óheftu og álítandi" Dimmalætting um, at "í politikki eins og í kærleika eru jú ongar reglur galdandi" fullkomiliga mugu standa fyri hansara egnu rokning. At hann ongar reglur hevur í sínum politiska arbeiði, vísir hann greitt í oddagreinini. Hvat kærleikanum viðvíkir, kann eg ikki lata vera við at hugsa: "Stakkals kona!"

# Veganetið dagførast í Kollafirði

**Hans Jákup Simonsen**
*Valevni fyri Javnaðarflokkin til Tórshavnar Býráð*



VAL04

Tað hevur leingi verið tørvur á grundstykkjum í Kollafirði, men synd er at siga, at tað hevur gingið skjótt hjá sitandi býráði at stykkja út í Kollafirði. Eg vil arbeiða fyri, at grundstykkir til eina og hvørja tíð eru tøk til tey, ið vilja búseta seg í Kollafirði. Tó er umráðandi, at man fer soleiðis fram, at man í so stóran mun sum møguligt tekur atlit til, hvat er dyrkað lendi og ikki, heldur enn at trumla fram uttan atlit til nakað ella nakran. Eisini má man stykkja út í smaúm ymsa staðni í bygdini, soleiðis at tey, ið vilja byggja Norðuri í Sundum sleppa tað, og tey, ið vilja byggja á Signabø ella aðrastaðni sleppa tað.

Eitt er grundstykkir, men veganetið má so sanniliga eisini dagførast, so tað passar til ferðsluna. Veganetið í Kollafirði er sum er rættiliga niðurslitið og enntá beinleiðis hættisligt í støðum. Hetta má fá-ast í rætt lag, skal nakað skil vera í. Ikki minst nú nýggjar útstykkingar standa fyr framman. Gongubreytir mangla flestu staðni og er tað ikki sørt løgið, at longsta bygd í Føroyum bert hevur ein gonguteig tvørturum vegin. Her er ikki væl lagt til rættis.

Eitt nýtt býráð eigur at leggja til brots beinavegin við dagføring av øllum veganetinum í Kollafirði, so tað passar til tann tørvin, ið longu er og ikki minst fer at koma við nýggju útstykkingunum.

# Tjóðveldið størst millum tey ungu

**Sambandsflokkurin, sum oftast er stinnur á býráðsvalinum í høvuðsstaðnum, hevur sambært kanningini lítla undirtøku millum tey ungu í Havnini**

BÝRÁÐSVALIÐ
*Jan Müller*




*Blaðið við veljarakanningunum í, sum verður borið í hvørt hús í høvuðsstaðnum*

Í dag stendur býráðsvalið í Føroyum í skugganum av amerikanska forsetavalinum. Men tað er bara ein vika, inntil føroyingarnir skulu til valborðini. Týsdagin 9. november eru býráðsval á skránni. Einki hevur verið at hoyrt um veljarakanningar undan býráðsvalunum, og í nógvum førum ber illa til at gera kanningar, tí uppstillingin er ikki flokspolitisk, og ofta er heldur talan um persónsval enn floksval.

Men í kvøld verður eitt blað borið í húsini í høvuðsstaðnum, sum 2. ð í Hoydølum hevur gjørt í sambandi við býráðsvalið. Í tí blaðnum er ein kanning, har ein kanning er gjørd um, hvat tey ungu ætla sær at velja.

Spurt verður eitt nú um, hvønn flokk tey ungu ætla sær at velja, og hvønn tey vilja hava at vera býráðsformann. 215 næmingar, sum ganga í 2. HH á handilsskúlanum í Havnini, og sum ganga í 1. HF og 3. s í Hoydølum vórðu spurdir. Hetta er ein ikki so lítil partur av teimum, sum týsdagin fyrstu ferð skulu velja. Samlaða talið av teimum, sum fyrstu ferð fara á býráðsval týsdagin, er 3000. Av hesum skulu 900 velja til býráðsvalið í høvuðsstaðnum. Bert tey, sum eru millum 18 og 21 ár, eru við í kanningini.

## Tjóðveldið størst

Fleiri upplýsingar eru at finna í blaðnum, sum verður borið út í kvøld. Sosialurin hevur kortini fingið úrslitið av floksbýtinum.

Tjóðveldisflokkurin eigur størstu undirtøkuna millum tey, sum í høvuðsstaðnum skulu á býráðsval fyrstu ferð. 29 % ætla sær at velja Tjóðveldisflokkin. Fólkaflokkurin eigur 25 og Javnaðarflokkurin 20 prosent av atkvøðunum hjá teimum ungu. Sambandsflokkurin eigur ikki serliga dygga undirtøku millum tey, sum skulu velja fyri fyrstu ferð. Sambært kanningini ætla bara 10 % av seta krossin fyri Sambandsflokkin. Miðflokkurin eigur 5 % og Sjálvstýrisflokkurin 2 % av atkvøðunum.

Enn tykjast vera ungar atkvøður, sum ganga leysar. 14 prosent av teimum ungu høvdu ikki tikið støðu, hvønn tey skuldu velja, tá ið kanningin varð gjørd. Kanningin varð gjørd í fystu vikuni av oktober. Tá var valstríðið ikki rættuliga byrjað. Síðani hevur nógv verið skrivað og rikið á annan hátt. Tí er væl hugsandi, at myndin kann vera broytt, men tað man neyvan vera nakar ivi um, at onkrar ábendingar eru í kanningini.

# Gloymda ættarliðið og hin fyrsta vikulønin

**Johan Mortensen**
*Valevni Tjóðveldisfloksins til Býráðið*



VAL04

Hvønn dag spyrja foreldur til fánýtis um arbeiði fyri teirra ungu sum ikki ganga í skúla. Onki arbeiði er til hesi gloymdu ungu í Havn. Harmuligt, hvussu søt er ikki hin fyrsta vikulønin Komi eg í Býráðið skulu fleiri arbeiðspláss útvegast ungum Havnaborgarum.





Haldarar hjá Sosialinum

ið ikki fáa leygardagsblaðið verða bidnir um at ringja tel 229725 leygardag millum kl. 11 og 14

Prentmiðstøðin